

## Nýtt Messi-met í Barcelona

22 ár og 206 dagar. So gamal – ella ungur – var Lionel Messi, tá hann í gjár skjeyt sítt mál nummar 100 fyri Barcelona. Og við hesum er hann nógv tann yngsti spælarin, sum hevur rokkið hesum tali. Metið undan hesum átti Mariano Martín, sum var 24 ár og 60 dagar, tá hann rakk teimum 100 málunum. Enn eru tó 14 spælarar framman fyri Messi á samlaða máltindinum hjá Barcelona, men uttan iva hevur argentinski áleyparin ætlanir um at skjóta fleiri mál enn tey, sum hann nú hevur skotið. Barcelona vann dystin leygardagin móti Sevilla við 4-0, og er felagið nú fimm stig framman fyri Real Madrid í bestu sponsku deildini.



Sørvingar vóru væl mannaðir á áskoðaraplássunum, tá SÍ og Fleyr spældu mansfinaluna í Føroya Banka-kappingini, og ikki fór teir heldur skuffaðir avstað aftur, tí SÍ vann og tryggjaði bygdini pláss í steypafinaluni

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

# Sørvingar í steypafinaluni

**SÍ, sum fyrr í heyst vann FK-kappingina, hevði møguleikan at spæla seg beinleiðis í steypafinaluna, um tað eisini eydnaðist at vinna Føroya Banka-kappingina. Tann kjansin tók SÍ, so tí verða í minsta lagi tvey lið úr Vágum í steypafinalunum**



einslistir@kallnet.fo

Hilmar Jan Hansen

Vágar eru sera væl umboðaðar í fremstu røð í flogbólti, har bæði SÍ og Dráttur hava lið í Eik-liguni hjá kvinnum, umframt at SÍ hevur lið í Eik-liguni hjá monnum. Og sum støðan er nú, er SÍ í øllum førum væl umboðað í steypafinalunum, sum verða í Havn 20. februar, og spurningurin er so, um Dráttur eisini skal megna at spæla seg í kvinnufinaluna, sum so verður ein rein Vága-finala.

Nú Mjølnir um vikuskiftið skipaði fyri Føroya Banka-kappingini, gekk tað sum fótur í hosu hjá SÍ-monnunum, ið struku ósigraðir gjøgnum alla kappingina. Hjá monnunum vóru bara fýra lið við, so tí var hon avgreidd í einum bólki, har SÍ og Fleyr gjørdust tey bæði fremstu liðini, sum tí skuldu spæla finalu.

Eyka bonus í finaluni var atgongd til sjálva steypafinaluna, og har hevði SÍ ein trumf liggjandi, tí liðið fyrr í heyst vann FK-kappingina. Eydnaðist at vinna aftur nú, var finalusessurin tryggjaður. Um tað hinvegin gjørdist Fleyr, ið vann, skuldu SÍ og Fleyr spælt ein altavgerandi dyst aftrat mikukvøldið um steypafinalusessin.

Mjølnir, sum skipaði fyri kappingini um vikuskiftið, slapp ikki at hava sítt manslið við, tí reglurnar siga, at liðini, sum eru komin í steypafinaluna umvegis oddasess fyrr í landskappingini, sleppa ikki at spæla við her. Tí vóru heldur ikki kvinnurnar hjá SÍ at síggja aðrastaðni, enn á áskoðaraplássunum, har sørvingar vóru serstakliga væl mannaðir til mansfinaluna í gjár.

### SÍ-Fleyr 3-0

(25-18, 25-16, 28-26)

Hóast nógv stóð upp á spæl, so gjørdist tað ikki fyrr enn í móti endanum á triðja setti, at eitt sindur av spenningi kom í finaluna millum SÍ og Fleyr. Eftir at SÍ hevði vunnið tey bæði fyrru settini sannførandi, var Fleyr nógv betur við í triðja setti, ið eisini til fulnar vísti, at tá hesi bæði liðini spæla upp til sítt besta, er torført at taka dagar ímillum tey.

Fleyr gekk undan ta fyrstu løtuna, men aftan á 11-11 gekk javnt á allan vegin uppeftir. Fleyr var við leiðsluni 24-23 fyrra liðið at hava settbólt, men síðani skiftust liðini at kunna avgera, til tað at enda var SÍ, ið fór avstað við settinum og sigrinum.

Tað var so tann spenningurin, tí – sum sagt – var SÍ nógv betri tey bæði fyrru settini. Bara fyrstu løtuna í fyrsta setti var javnt, men so fór SÍ avstað og vann trygt. Og í øðrum setti fekk Fleyr slett einki gjørt við SÍ, ið spældi sera væl og fekk alt at bera til, og samanlagt var eingin ivi um, at tað var klárt betra liðið, ið vann finaluna og uppiborið slapp í steypafinaluna.

**Øll úrslitini frá Føroya Banka-kappingini kunnu síggjast á síðu 16**

## Ótrúliga súrt

– Tað er ótrúliga súrt at tapa í dag, tí vit hava spælt fult upp ímóti teimum alt kappingarárið, staðfesti Janus úr Dímun eftir finaluna í Føroya Banka-kappingini, har Fleyr tapti 0-3 fyri SÍ, sum sostatt streyk av stað við steypafinaluplássinum.

– Í fyrsta setti spældu vit sum eitt hol í jørðini, men í øðrum setti vóru teir ótrúliga góðir og vunnu allar bóltar. Í triðja setti koma vit í gongd og spæla upp ímóti teimum allan vegin, men tá teir síðstu bóltarnir koma, tora vit ov illa at avgera tað, men tveita bóltin yvir til teirra. Teir vunnu uppiborið, tí tað er ikki nóg mikið at spæla eitt gott sett í einum slíkum dysti.

**hil**

## Ikki verið betri

– Størsti munurin á okkum og Fleyr í dag var, at álopsspælið og verjan hjá okkum var betri. Tað stóð eitt sindur á í triðja setti, men vit fingu so koyrt tað heim, segði fegni hevarin hjá SÍ, Ólavur Jensen, eftir 3-0 finalusigurin á Fleyr, ið samstundis gav SÍ beinleiðis atgongd í steypafinaluna, sum verður ímóti Mjølnir.

– Fyri okkum er tað ein stórur létti, at vit kundu avgera tað í dag, tí tað hevði verið strævið at skula spælt aftur mikukvøldið, nú vit hava havt nógvar dystir í síðstuni. Hjá okkum var tað eisini gott, at vit í hesi finaluni vístu nakað av tí frægasta spælinum, vit hava spælt í ár.

**hil**

## Líkamikið hvør vann

– Fyri okkum var tað líkamikið, um tað var SÍ ella Fleyr, sum vann, tí hetta eru alt jøvn lið. Hjá okkum ræður bara um at vinna steypafinaluna, óansæð hvørjum vit spæla ímóti. Men 3-0 sigurin hjá SÍ var bæði sannførandi og uppiborin, segði Mjølnir-spælarin, Thorvald Danielsen, sum í gjár sat sum skrivari við dómaraborðið, tí Mjølnir ikki kundi spæla við í síni egnu kapping.

– Tað er eitt sindur keðiligt, at vit ikki eisini kundu spæla. Kanska skuldu reglurnar verið broyttar, so tað eitt lið sleppur at vera við í hesi kappingini, hóast tað longu hevur vunnið seg í steypafinaluna.

**hil**